## VIÐMERKINGAR

# Føroyingar minnast betur, enn tit halda

**Jóannes Eidesgaard**



Jenis av Rana saman við Høgna Hoydal førdu báðir fram undir viðgerðini av uppskoti landsstýrisins til skattalætta henda dagin, at skattalættin, sum eg vegna landsstýrið legði fram í 1995, og sum varð samtyktur av einum samdum løgtingi (íroknað Miðflokkin og Tjóðveldisflokkin, sum báðir sótu í andstøðu) vendi sosialt skeivt. Ein reingjan av sannleikanum, sum møguliga skal rættvísgera, at sitandi samgonga við sínum skattalætta fullkomiliga gloymir láginntøkurnar.

Eg havi satt at siga eitt sindur torført við at skilja, hví serliga Jenis av Rana og partvíst eisini Høgni Hoydal brúktu so nógva tíð upp á at viðgera skattalættan, sum eg sum landsstýrismaður legði fram og fekk samtyktan í des. 1995, tá ið tað var teirra egna uppskot til skattalætta, sum var til viðgerðar.

Mínar høvuðsviðmerkingar til uppskotið hjá Karsten Hansen, landsstýrismanni vóru, at landsstýrið veruliga gevur miðalinntøkunum (uml. 220.000kr.) ein góðan skattalætta. Hetta fegnaðist eg um og takkaði landsstýrinum fyri. Eg nevndi eisini, at tímalønt, sum altíð arbeiða minst 40 tíma viku eisini fáa ein lítlan skattalætta, tó hesin kundi verið væl størri. Men trupulleikin var, at tey mongu tímaløntu á okkara fiskavirkjum, sum ikki fáa eina fulla viku, og tey eru rættiliga nógv í tali, tey fáa stórt sæð ongan lætta. Og tí er tað ikki rætt, tá landsstýrið sigur í sínum viðmerkingum, at lættin kemur fyrst og fremst lág- og miðalinntøkunum til góðar. Miðalinntøkurnar er rætt, men so avgjørt ikki láginntøkurnar. Hin vegin so er líkt til, at háinntøkurnar oman fyri 500.000 kr fáa í bæði posa og sekk.

- (eini hjún á einum flakavirki, sum forvinna 150. 000kr í part): 3720 kr./ár ella 310 kr./mðr.
- (eini hjún, sum hvør forvinna 220.000 kr í part): 10.320 kr./ár ella 860 kr./mrð.
- (eini hjún, har annar forvinnur 520.000 kr og hin 220.000 kr): 13.420 kr./ár ella 1118 kr/mðr.

Tá man so eisini tekur tað við, at henda samgonga, sum Jenis av Rana er stuðulin undir, eisini hevur hækkað nógv gjøld og prísir (eitt nú Svf-gjald, mjólkaprísir, ferðaseðlaprísir, uppihaldspeningin burtur, versnandi kor í barnasignini fyri tímalønt), so gevur man láginntøkubólkunum við aðrari hondini, meðan man longu hevur tikið meira enn bróðurpartin innaftur við hinari hondini.

Um tað var hetta, sum fekk Jenis av Rana og so seinni eisini Høgna Hoydal at føra fram, at eg skuldi havt givið ein munandi meira assosialan skattalætta í 1995, tað er møguligt, men tað vísir so bert, at teir ikki kenna seg serliga væl við henda kritikkin, sum Javnaðarflokkurin førdi fram.

Men lat okkum so taka sannleikan fram um lættan í 1995:

- Skattastigin broyttur, soleiðis at inntøkur undir 220.000 kr. fáa størsta lættan (kostaði 80 mió. kr.)
- Barnafrádráttruin hækkaði úr 2.400 kr. til 2.900 kr. (kostaði 5. mió. kr.)
- Viðbótin til ávísar pensjonistar hækkaði við 3,5 mió. kr
- Skattahámarkið lækkaði úr 55% niður í 52% (kostaði 2,5 mió. kr.)

Hesin skattlættin kostað sostatt 91 mió. kr. og er størsti skattalætti, sum nakrantíð er givin í einum.

Jenis av Rana hevur síðani bara fokuserað upp á hetta, at skattahámarkið lækkaði 3%. Eg havi roynt at greitt sama Jenisi frá, at hetta var sjálvsagt partur av tí semju, sum Javnaðarflokkurin mátti ganga við til, til tess at øll hini tiltøkini kundi fáast upp á pláss. Hetta var ein politisk telving, har eisini borgarligi parturin av samgonguni skuldi hava sítt. Soleiðis er politikkur.

Men eitt samt løgting tók undir við málinum í 1995, og umboð Tjóðveldisfloksins í fíggjarnevndini (Finnbogi Ísakson) var beinleiðs partur av meirilutaálitinum, meðan umboð Miðfloksins (Tordur Niclasen) hevði sínar viðmerkingar, men annars eisini tók undir við uppskotinum.

Vit skulu eisini minnast til eitt, at hetta var í 1995, og enn var bakslátturin av kreppuni stórur. Vit bardist við at fáa javnvág á fíggjarlógina, og føroyingurin var verri enn so komin yvir skelkin, sum kreppan gav okkum øllum. Men vit mettu, at tíðin var búgvin, og eri sannførdur um, at júst hesin skattalættin hevði eina avgerandi ávirkan á, at vónin og trúgvin upp á framtíðin aftur birtirst í føroyinginum.

# Saltsiloin á Drelnesi – ruin ella komandi Mentunnarkatedralur

**Albert Isfeld**
*Arkitektur A.F.*



Fyrstu ferð eg sá Saltsiloina á Drelnesi, var eg 13 ára gamal á ferð við Skótalið Sigmunds Brestissonar í Suðuroy saman við øðrum skótaliðum kring landið og úr Danmark at liggja í skótalegu.

Vit skuldu um fjallið til Fámjins at liggja við Fámjinsvatn. Tá vit koma gangandi eftir vegnum, síggja vit henda stóra bygningin standa niðri við sjóvarmálan, dagandi upp í luftina sum ein katedralur – eitt stórverk – í bogaðum skapi, borið uppi av stórum parabelformaðum betongkonstruktiónum.

Henda sjón gjørdi eitt øgiligt inntrykk á meg og havi eg líka síðan, hvørja ferð eg eri í Suðuroy, gjørt steðg við siloina at njóta løtuna við henda bygning. Her er ein bygningur, sum brýtur frá tí vanliga, og má sigast at standa sum ein varði yvir byggilist í Føroyum, har stórir tankar og visiónir hava verið berandi fyri eina glæsiliga framtíð. Tað er onki at taka seg aftur í at, hetta bygningsverk er eindømi í Føroyum, og helst telist millum frægastu bygningsverk í Norðanlondum.

Tað var í 1937, at hesin bygningur bleiv bygdur til at rúma saltgoymslu, og hevur tað seinastu tíðina verið brúktur til ruskgoymslu.

Tað sær út til, at ongin veruliga hevur gjørt átøk at varðveita hetta stórverk, sum beint nú stendur og forfellur – ikki tí – røddir hava verið frammi í bløðunum og millum fólk í Suðuroy at gera tiltøk til varðveitslu.

Helst hava nógv byggi- og søgufólk, sum eru komin ferðandi hendavegin, undrast yvir, at onki er gjørt at fjálga um henda bygning.

Mær kemur til hugs kirkjubømúrin – her hevur kjakið gingið, um múrurin er ein ruin (fornfrøðingarnir) ella um múrurin er eitt bygningsverk (arkitektarnir), vóni ikki at líknandi kjak í framtíðini verður um Saltsiloina á Drelnesi ella uppaftur verri, at siloin verður niðurrivin sum eitt »skrýmsl«, sum onkur hevur málborið seg.

Tíðin er nú komin til at varðveita henda bygning og geva honum annað innihald. Til ber at varðveita skapið og nútímansgera bygningin uttan og innan. Her eru óteljandi møguleikar í tí høga rúminum at skapa karmar fyri alskyns mentanarvirksemi sum t.d. tónleiki, sjónleiki, listaframsýningum, fundum av ymsum slag v.m.

Fíggjarliga er hetta eitt skilagott tiltak – útgrevstur og høvuðskonstruktión eru tøk, hetta kann merkja eina sparing í byggiútreiðslum uppá einar kr. 5 til 10 milliónir, leysliga mett.

Nýggja ferjulegan og ein nýggjur Smyril, sum leggur at beint við, vilja draga tiltøk til sín frá øðrum pørtum av landinum.

Við tunnlinum frá Øravík til Hovs verður øll Suðuroyggin samnabundin á ein hátt, so til ber at siga, at Siloin á Drelnesi kann blíva ein mentanarkatedralur fyri alla oynna, bert allar góðar kreftir finna saman í einum felags átaki hesum at frama.

Nevnast kann, at nýggja mentanarhúsið í Fuglafirði hevur havt avgerandi týdning fyri mentanartiltøk í bygdini og fyri alla Eysturoynna og er blivin eitt hugtak um alt landið eins og Norðurlandahúsið.

Vónandi verður hetta uppskot til veruleika einaferð, so hesin bygningur, sum ein fuglurin Føniks, aftur verður at daga upp í luftina í fullum skrúð, sum karmur um mentanartiltøk í Suðuroy.








35ár

Tann 1. mars 2003 eru liðin 35 ár, síðan Jóhannes Berg skrivaði sáttmála við Mazda í Hiroshima

Í hesum sambandi hava vit opið leygardagin 1. mars við nøkrum einastandandi tilboðum, har vit draga 35.000,- krónur av nýprísinum á hvørjum av hesum bilum:

1. Mazda 323 1.6i Hatchback Exclusive, 5 hurðar, grønur, fyrr 190.700,- kr, nú 155.700,- kr
2. Mazda 323 1.6i Hatchback Exclusive, 5 hurðar, bláur, fyrr 190.700,- kr, nú 155.700,- kr
3. Mazda 323 1.6i HatchbackTouring AC, 5 hurðar, reyður, fyrr 198.700,- kr, nú 163.700,- kr
4. Mazda 323 1.6i Sedan Touring,............. 4 hurðar, beige, fyrr 190.700,- kr, nú 155.700,- kr
5. Mazda 323 1.6i Sedan Touring,............. 4 hurðar, grønur, fyrr 190.700,- kr, nú 155.700,- kr
6. Mazda 323 1.6i Sedan Touring,............. 4 hurðar, bláur, fyrr 190.700,- kr, nú 155.700,- kr
7. **Mazda Premacy LX Diesel,................. 5 hurðar, bláur, fyrr 218.700,- kr, nú 183.700,-kr**
8. Mazda 626 2.0i GLX AC, ......................... 4 hurðar, grønur, fyrr 212.700,- kr, nú 177.700,- kr
9. Mazda 626 2.0i GLX AC, ......................... 4 hurðar, svartur, fyrr 212.700,- kr, nú 177.700,- kr
10. Mazda Wagon GLX 2.0l, ........................ 4 hurðar, svartur, fyrr 208.700,- kr, nú 173.700,- kr

Umframt hesi tilboð hava vit leygardagin og í komandi viku framsýning av Mazda Demio, Mazda 323, Mazda 626, Mazda 6, Mazda Premacy, Mazda E2200, Mazda B2500, Mazda MPV og Mazda Tribute 4x4



Opið er leygardagin 1. mars frá 10 til 16

Staravegur 1-3
Box 1039
FO-100 Tórshavn
Tel. 31 35 35

BERG MOTORS PF.